# Vildu ikki senda tyrluna

Skiparin á íslendska verksmiðjutrolaranum Hrafni er í øðini inn á bjargingartænastuna, tí hon sýtti fyri at senda eina tyrlu eftir einum manni, sum hevði fingið skaða umborð. Maðurin kom í eina flakamaskinu og misti eitt petti av einum fingri. Skiparin bað bjargingartænastuna senda eina tyrlu eftir manninum, men svarið var nei, tí ein lækni metti ikki málið vera nóg álvarssamt. Tað tók Hrafni seks tímar at sigla til lands við manninum.








*Skal valdið flytast úr Keypmannahavn skal tað ikki flytast til Brússel, men heim til Førya, sigur Jørgen Niclasen.*

# Valdið flytast til Føroya

**Tað kemur ikki upp á tal at flyta valdið úr Keypmannahavn til Brússel. Skal valdið flytast, skal tað flytast til Føroya, sigur Jørgen Niclasen**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Heldur ikki Fólkaflokkurin tekur undir við ætlanunum hjá Sambandsflokkinum at lima Føroyar inn í ES gjøgnum Danmark.

- Vit vilja hava limaskap í EFTA, og harvið fáa atgongd til tey fýra frælsini. Noregi og Ísland hava hendan limaskap, og tí kemur tað ikki hesum londum til hugs, at fara upp í ES, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at tað nyttar einki at tosa um atlimaskap í ES, tí ein slíkur er stutt sagt ikki til.

- Fara vit inn í ES sum ein partur av Danmark, koma vit í somu støðu sum Áland. Vit avreiða alt vald og hava ikki so frægt sum talirætt í limaskapinum, sigur Jørgen Niclasen.

Hann heldur tí, at ein avtala við EFTA millum tveir partar á jøvnum føti, hevði verið tað virðiligasta.

- Um vit vilja tað ella ei, so er fiskivinnan framvegis høvuðsvinnan. Eg havi vitjað nógv fiskivinnusamfeløg í ES, serstakliga Skotland, Ongland, Írland og Norðurírland, og tað er ein sorgarleikur at síggja. Støð, sum ein og hvør, sum hugsar um ES-limaskap, eigur at vitja. ES-fiskivinnupolitikkurin hevur sligið fullkomiliga feil, sigur Jørgen Niclasen.

Viðvíkjandi undantaki fyri fiskivinnuna sigur formaður Fólkafloksins, at eingin fær undantøk innan ES. Áland fekk undan tøk viðvíkjandi heimstaðarrætti og sjóvinnu, men hesi vórðu avmarkað til tíggju ár.

## Tey fýra frælsini

- Undantøk verða ikki givin innan fiskivinnuna, men skuldi tað hent, mugu vit rokna við somu treytum sum Áland. Tað vil siga, at vit í besta føri kunnu vænta okkum tíggju ár, áðrenn vit mugu avreiða valdið á fiskivinnuøkinum til ES, sigur Jørgen Niclasen.

Hann heldur tí, at úttalilsini hjá Kaj Leo Johannesen, har hann mælir til ES-limaskap gjøgnum Danmark, er einki annað enn illa umhugsað populistiskt valagn.

- Ein EFTA-limaskapur við avtalu um tey fýra frælsini er nakað, ið veruliga ber Føroyar fram, samstundis sum vit varðveita avgerðarrættin her heima hjá okkum sjálvum, sigur Jørgen Niclasen.

Hann er sostatt samdur við Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum og Høgna Hoydal úr Tjóðveldi um, at vit ikki eiga at fara upp í ES gjøgnum Danmark, men heldur ganga saman í EFTA saman við eitt nú Íslandi og Noregi.

- Við verandi ríkisrættarligu støðu kemur tað ikki upp á tal at flyta valdið úr Keypmannahavn til Brússel. Skal valdið flytast, skal tað flytast til Føroya, slær formaðurin í Fólkaflokkinum, Jørgen Niclasen, fast.

# EBS ikki fyri samríkislond

**Men alt er møguligt í framtíðar samráðingum og sjálvandi avreiða vit einki sjálvræði, sigur Kaj Leo Johannesen**

VAL 08
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Løgmaður kom úr aftur Brüssel fyri tíð síðani við einari avtalu við ES um gransking. Sambandsflokkurin hevur altíð trúð uppá at henda avtala skuldi koma í hús, atfinningarsamar røddir høvdu verði frammi áðrenn hendan fund um at hetta fór ikki at lata seg gera.

Tað sigur Kaj Leo Johannesen. Hann vísir við hesum á, at samstarv og samráðingar er vegurin fram.

Eitt er at blaka pástandir út um framtíðina, og at gita um, hvat ES fer at krevja av føroyingum. Men hvat høvdu føroyingar sagt, um vit fingu prógvað yvirfyri ES, at fiskidagaskipanin er ein fongur fyri Føroyar? Og hvat um vit fingu sannført ES limalondini um, at tað loysir seg at brúka okkara skipan, og at fyri hvønn dag sum gongur, tapa ES-limalondini hópin av peningi orsaka av, at tey ikki enn hava sett okkara fiskidagaskipan í gildi? Spyr Kaj Leo Johannesen.

Hann vísir ál at heimurin broytist skjótt, og tað er positivt, at føroyingar halda áfram at greiða ES-myndugleikunum frá, hvussu góð fiskidagaskipanin er, tí málið eigur at vera, at ES tekur okkara skipan til sín. Hetta kundi ført við sær, at limalondini byrjaðu at umsita fiskiríkidømið hvørt sær.

Víðka sjónarringin

Tað er avgerandi fyri framtíð Føroya, at vit víðka okkara sjónarring og tora at trína inn í altjóða samfelagið, heldur enn at byrgja okkum inni, soleiðis sum gjørt hevur verið higartil. Orð ella gitingar sum »Vit avreiða alt sjálvsræði til ES«, hoyra ikki heima í hesum sambandinum, sigur Kaj Leo Johanesen.

Hann sigur, at tann einasti mátin, vit kunnu gerast klókari uppá, hvørjar treytir Føroyar kunnu fáa frá ES, er at tingast beinleiðis við ES. Vit kunnu ikki byggja framtíð Føroya á gitingar, heldur hann.

Hann sigur víðari, at um treytirnar, ið ES setir okkum, eru órímiligar, taka vit sjálvandi ikki av tilboðnum. Men sambandsflokkurin trýr uppá, at tað fer at bera til at fáa eina góða avtalu í lag við ES.

Vit noyðast longu sum er at lúka nógv av teimum krøvum, sum ES setur til limalondini. Men í verandi støðu hava vit eingi rættindi í ES og fáa tískil heldur ongan ágóða av at ganga undir ES-krøv, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann sigur tað vera eina sjálvfylgju, at vit ikki skulu geva hvørki okkara fiskiríkidømi ella oljuríkidømi burtur. Men heldur enn at gita, hvørjar treytir ES fer at seta okkum, eiga vit at tingast við henda felagsskap, fyri at fáa staðfest, hvat ES hevur at bjóða føroyingum. Vit skulu »vita og ikki gita«.

Men fyrsta treytin fyri konstruktivum samráðingum er, at vit orka tankan og vilja tosa, heldur hann.



*Kaj Leo Johannesen heldur tað vera ov vánaligt av hinum flokkunum bara at siga tað vera ómøguligt, heldur enn at kanna fyrst, hvørjar treytir ES í veruleikanum setur*

Vit hava havt fiskivinnusáttmálar við ES síðani 1977 og kenna væl til at samráðingar geva okkum altíð ein javnvág í virði millum tað vit lata av fiski og tað vit fáa og er hetta meginreglan ES avtaluleistin. So lat okkum tora at koma til eitt samráðingarúrslit við ES, sum vit so leggja til eina fólkaatkvøðu, eingin kann verða bangin fyri at spyrja sítt egna fólk, sigur Kaj Leo Johannesen.